# Eldraráðið í Havn kannar tørvin hjá teim eldru

Eldraráðið í Havn hevur sent øllum borgarum í kommununi, sum eru 60 ár og eldri, eitt spurnarblað, so tey kunnu geva myndugleikunum fult yvirlit yvir tørv teirra eldru. Talan er um 3.340 brøv. Eldraráðið í Tórshavnar kommu heldur tað vera av størsta týdningi, at tey eldru sjálv eru við til at áseta eldrapolitikkin í kommununi. Tí hevur ráðið sent borgarum, sum eru 60 ár og eldri áheitan um at svara spurningum, sum eru sendir teimum. Endamálð er at geva kommununalu myndugleikunum fult yvirlit yvir tørv og ynski borgaranna. Fyrsta valið til eldraráð var í november 2005. Fimm limir eru í ráðnum. Allir borgarar í kommununi, sum eru fyltir 60 ár, kunnu stilla upp til eldraráðið. Val til eldraráðið er fjórða hvørt ár fyrstu viku í oktober. Hetta fyrsta valskeiðið gongur út 31. desember 2008, og 1. januar í 2009 tekur nýggja eldraráðið við.

**Limirnir í eldraráðnum eru:**

Marita Arge Magnussen, forkvinna - Súni Vinther - Elinborg Trónd Johansen - Jákup Lindenskov og Anna Sofía Poula Apol





- Tað, sum nú ræður um, er at finna eina sømiliga loysn fyri fiskimenninar, so hesir kunnu fáa tað, teir eiga til góðar hjá reiðaranum.

Formaðurin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag hevur skilt, at Topaz er eitt stórt verksmiðjuskip, sum Bjarti Mohr hevur keypt, og sum leingi hevur verið til umbyggingar í Las Palmas á Grand Kanaria.

- Sum eg skilji, hevur umbyggingin ikki gingið eftir vild, og skipið er tískil ongantíð komið til fiskiskap.

Eyðstein Djurhuuus heldur, at einir 70 mans vóru umborð á skipinum í byrjanini, og nú eru so 42 eftir umborð.

- Vit hava skilt menninar soleiðis, at teir vilja ikki fara at skipinum, fyrr enn teir hava fingið sína hýru, tí fara teir fyrst heim, er vandi fyri, at teir ongantíð fáa sín ágóða, sigur formaðurin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag.

*- Sum eg havi skilt, hevur umbyggingin av Topaz, sum liggur í Las Palmas, ikki gingið eftir vild, og tí er stóri verksmiðjutrolarin ongantíð komin til fiskiskap, sigur Eyðstein Djurhuus, formaður í Føroya Skipara-og Navigatørfelag*

# Vónandi í næstu viku

**Bjarti Mohr, reiðari, sigur, at trupulleikin hjá honum við hýruni hjá manningini umborð á Topaz er, at hann bíðar eftir peningi, sum hann hevur til góðar hjá einum øðrum reiðaríi**

TOPAZ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Við útvarpið hjá Kringvarpinum segði Bjarti Mohr, reiðari í gjár, at hann bíðar eftir peningi, sum hann hevur til góðar hjá einum statsreiðaríi fyri sølu av skipinum, Glen Rose.

- Avtalan fevnir um 10 miljónir krónur, men enn er eingin peningur komin, sigur hann, og tí hevur likviditet til at gjalda manningini umborð á Topaz sína hýru í løtuni.

Bjarti Mohr vísir á, at hann í februar í ár gjørdi sáttmála við eitt statsreiðarí, og henda avtalan skuldi innfríast í apríl í ár.

- Men enn hevur reiðaríið ikki goldið okkum peningin, og tí havi eg ikki megnað at hildið mínar skyldur mótvegis monnunum, sum eru umborð á Topaz.

Reiðarin sigur, at hann gjørdi avtaluna við reiðaríið í reinum sinni – og í góðari trúgv.

- Hetta gjørdi eg, tí trupulleikar plaga ikki at vera við statsreiðaríum. Men nú hava teir lovað at komið við einari bankatrygd.

Bjarti Mohr sigur við útvarpið hjá Kringvarpinum, at sjómenninir við Topaz hava fingið tað, sum svarar til forskotið, sum teir eru vanir at fáa við russiskum skipum.

- Eg vóni, at bankatrygdin kemur innan fyri eina viku, so sjómenninir kunnu fáa sítt. Gongur tað ikki, noyðist eg at finna alternativar loysnir, sigur reiðarin.

# Ein vónleys manning í brævi til føroyingar

**- Myndugleikarnir í Las Palmas sýta fyri at lata okkum bingjur til rusk. Vit noyðast tískil at hava alt ruskið umborð. Hetta merkir, at Topaz við tíðini gerst eitt ruskpláss, sigur manningin á føroyska verksmiðjutrolaranum í brævi til føroyingar**

TOPAZ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Manningin, sum er eftir umborð á føroyska verksmiðjutrolaranum Topaz, sum liggur í Las Palmas á Grand Kanaria, hevur sent bræv til manningarfeløg í Føroyum, føroyskar myndugleikar, fjølmiðlar og ITF umboð í London.

Brævið er dagfest 2. september í ár.

- Nøkur av tykkum hava hoyrt um teir trupulleikar, sum vit hava fingið. Fyri einum mánaða síðan bóðu vit um tykkara hjálp til at loysa okkara trupulleikar. Men tíverri eru vit enn í somu støðu. Okkara sáttmáli er úti, og vit eru framhaldandi umborð. Vit hava onga løn fingið í 6-7 mánaðir. Hvør vika byrjar við orðum frá okkara reiðara, Bjarta Mohr, um, at vit skulu vera róligir, tí hýran kemur skjótt.

## Aðrir trupulleikar

Manningin sigur í brævinum, at reiðarin eisini skyldar skipaumboðsmanninum og havnamyndugleikunum í Las Palmas pening.

- Hetta er eisini vorðið ein trupulleiki hjá okkum, tí myndugleikarnir sýta fyri at lata okkum bingjur til rusk. Vit noyðast tískil at hava alt ruskið umborð. Hetta merkir, at skipið við tíðini gerst eitt ruskpláss.

Teir siga, at eingin heldur vil veita teimum olju, hóast oljan er við at ganga undan.

- Hvat verður tað næsta, vatn ella matur? spyrja teir.

Manningin heldur, at reiðarin vil hava teir at fara av skipinum, áðrenn hýran er goldin.

- Vit skilja, at um onkur okkara ynskir at fara heimaftur, vil reiðarin syrgja fyri, at ferðaseðilin verður goldin, men eingin hýra.

Sum skilst á brævinum, sum manningin hevur sent heim til Føroya, hava teir ringar vónir um eina loysn.

## Alt sápubløðrur

- Vit duga ikki at síggja, at nakað hendir. Vit hava framhaldandi ongan pening fingið og síggja onga framtíð fyri okkum og familjur okkara. Lyftini, sum vit hava fingið, eru sum sápubløðrur.

Manningin umborð á Topaz, sum í løtuni telir 42, heitir tí á manningarfeløg, myndugleikar og ITF um at hjálpa sær í trætuni við reiðaran um hýruna.

